FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
8. oktober 2014
Mál: 14/00599-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 8/2014

**Fyrispurningur um keyp og sølu av fiskiførum við veiðiloyvi, settur Jacob Vestergaard, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

**Høgni Hoydal, løgtingsmaður**

1. Hvussu nógvar sølur/keyp av fiskiførum við veiðiloyvi eru farnar fram higartil í 2014?
2. Hvussu nógvar flytingar av veiðiloyvum millum fiskifør eru farnar fram higartil í 2014?
3. Hvussu nógv er keyp/søluvirðið av hesum handlum/flytingum tilsamans?
4. Hvussu nógv av hesum kann metast at vera virðið á sjálvum fiskifarinum, og hvussu nógv av hesum kann metast sum gjald fyri veiðiloyvi?
5. Hvørji fiskifør er talan um og í hvørjum bólki?
6. Hvussu stórur partur av hesum handlum/flytingum eru keypt og vunnin av eigarum, har útlendskur kapitalur er uppií?
7. Hvussu stóran part hevur tann vanliga manningin/fiskimaðurin, sum ikki eigur í fiskiførunum, fingið av søluvirðinum?
8. Hevur Fiskimálaráðið og stovnar tess góðkent allar sølur og flytingar - og hvussu fer kanning fram um, hvørt lógir verða hildnar - eitt nú um útlendskan ognarlut?
9. Heldur landsstýrismaðurin og embætisverk fast um, at tað, sum fer fram við keypi, sølum og flytingum av fiskiførum við veiðiloyvi, er heimilað í lógini um vinnuligan fiskiskap - og um so er, hvar í lógini og við hvørjari tulking?
10. Heldur landsstýrismaðurin, at eitt veiðiloyvi - ið er eitt brúksloyvi til almenna ogn - skal gerast ogn hjá privatum, ið kann seljast sum ein vøra og eitt spekulasjónsvirði - og hvør verulig virðisskapan liggur í tí?

**Svar:**

**Til nr. 1.**
Sjóvinnustýrið, sum er myndugleikin, ið umsitur og skrásetur sølur av fiskiførum, hevur upplýst fyri Fiskimálaráðnum, at higartil í 2014 hava føroysk fiskifør í 41 førum skift eigara.

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

**Til nr. 2.**
Higartil í 2014 eru avgreidd 20 mál um at flyta veiðiloyvi við heimild í § 8 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

**Til nr. 3.**
Virðið í møguligum avtalum, sum partar gera, tá veiðiloyvi verða flutt, er ikki partur av málsviðgerðini hjá Fiskimálaráðnum ella VØRN. Tí hevur Fiskimálaráðið ikki skrásettar nakrar upplýsingar hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi sølum av fiskiførum hevur Sjóvinnustýrið upplýst fyri Fiskimálaráðnum, at skrásetta virðið í teimum 41 sølunum, sum hava verið higartil í ár, tilsamans er góðar 552 mió. kr.

**Til nr. 4.**
Fiskimálaráðið hevur onga skráseting ella meting av, hvat er virðið á sjálvum fiskifarinum, og hvussu nógv kann metast sum gjald fyri veiðiloyvi.

**Til nr. 5.**
*Flytingar av veiðiloyvum*
Higartil í ár eru avgreiddar hesar flytingar av veiðiloyvum eftir heimildunum í § 8 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap:

| **Flutt av** | **Flutt á** | **Bólkur** |
|---|---|---|
| Varðborg XPPI | Sermilik II OW2202 | Rækjuskip |
| Næraberg XPXK | Slættaberg OW2333 | Ídnaðarskip |
| Slættaberg OW2333 | Næraberg XPXK | Ídnaðarskip |
| Sermilik II OW2202 | Grunnabarð OW2381 | Suðurkyrrahavið |
| Høgiklettur OW2140 | Akraberg XPLH | Nótaskip |
| Sermilik II OW2202 | Asbjørn Senior OW2031 | Suðurkyrrahavið |
| Gadus XPXO | Sjúrðarberg OW2408 | Flakatrolarar |
| Sjúrðarberg OW2408 | Gadus XPXO | Flakatrolarar |
| Havborg OW2163 | Slættaberg OW2333 | Rækjuskip |
| Akraberg XPLH | Høgiklettur OW2140 | Nótaskip |
| Arctic Viking OW2399 | Næraberg XPXK | Rækjuskip |
| Næraberg XPXK | Arctic Viking OW2399 | Rækjuskip |
| Gullberg OW2307 | Fram XPUK | Bólkur 2 |
| Klakkur XPZB | Klakkur XPPR | Bólkur 3 |
| Eystnes XPYI | Eysturoyingur OW2003 | Bólkur 3 |
| Nim XPYB | Varðborg XPPY | Garnaskip |
| Tórun K XPRB | Pumin K XPRA | Bólkur 2 |
| Pumin K XPRA | Tórun K XPRB | Bólkur 2 |
| Pison XPZH | Pison XPZJ | Bólkur 3 |
| Barið OW2418 | Ran XPKY | Bólkur 3 |

*Fiskiskipasølur*

Yvirlitið niðanfyri, sum er gjørt við støði í upplýsingum frá Sjóvinnustýrinum, vísir sølur av fiskiførum higartil í ár, og hvørjum bólki tey vóru í, tá tey vórðu seld. Í teimum førum fiskifar er selt meira enn einaferð í 2014, er dagfesting tilskilað.

| Fiskifar | | Bólkur |
|---|---|---|
| Akraberg XPLH | 09.07.14 | Flakatrolarar |
| Akraberg XPLH | 07.10.14 | Nótaskip |
| Brandur OW2314 | | 5 |
| Búgvin OW2178 | 06.01.14 | 4T |
| Búgvin OW2178 | 08.07.14 | 4T |
| Grønhólmur XPQY | | 5 |
| Gihon OW2376 | | 4B |
| Heiðrikur XPSW | | 4A |
| Norðsøki XPUF | 20.02.14 | 4B |
| Norðsøki XPUF | 30.05.14 | 4B |
| Núpur XPZB | | 3 |
| Leitissteinur OW2021 | | 4B |
| Pison XPZJ | 04.04.14 | 3 |
| Pison XPZJ | 24.07.14 | 3 |
| Pumin K XPRA | | 2 |
| Rankin OW2312 | 05.06.14 | 2 |
| Rankin OW2312 | 06.06.14 | 2 |
| Svanurin OW2358 | | 5 |
| Sancy OW2210 | | 5 |
| Sermilik OW2202 | | Rækjuskip |
| Tórun K XPRB | | 2 |
| Varðborg XPPI | | Garnaskip |
| Váðasteinur OW2185 | | 3 |
| Næraberg XPXK | 19.09.14 | Ídnaðarskip |
| Næraberg XPXK | 06.10.14 | Rækjuskip |
| Eysturoyingur OW2003 | 22.08.14 | 3 |
| Eysturoyingur OW2003 | 25.08.14 | 3 |
| Eysturoyingur OW2003 | 19.09.14 | 3 |
| Høgiklettur OW2140 | | Nótaskip |
| Grunnabarð OW2381 | | Suðurkyrrahavið |
| Slættaberg OW2333 | | Ídnaðarskip |
| Leitið OW2242 | 10.04.14 | 4A |
| Leitið OW2242 | 23.09.14 | 4A |
| Barið OW2418 | 07.08.14 | 3 |
| Barið OW2418 | 14.08.14 | 3 |

| Fiskifar | | Bólkur |
|---|---|---|
| Beinisvørð XPVS | 14.07.14 | 2 |
| Beinisvørð XPVS | 16.07.14 | 2 |
| Beinisvørð XPVS | 18.07.14 | 2 |
| Beinisvørð XPVS | 21.08.14 | 2 |
| Dragasund OW2366 | | 4T |
| Frim OW2220 | | 5 |

**Til nr. 6.**
Av teimum 20 málunum um flytingar av veiðiloyvum eftir heimildunum í § 8 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap er, sambært upplýsingum hjá Fiskimálaráðnum, útlendskur kapitalur í 14 førum uppi í feløgunum, sum eiga fiskifarið, ið veiðiloyvið er knýtt at.

Av teimum 41 sølunum av fiskiførum, nevndar í svarinum upp á spurning 5, er, sambært upplýsingunum hjá Fiskimálaráðnum, útlendskur kapitalur uppi í 17 av feløgunum, sum keyptu fiskiførini.

**Til nr. 7.**
Fiskimálaráðið hevur ikki upplýsingar um, hvussu stóran part tann vanliga manningin/fiskimaðurin, sum ikki eigur í fiskiførunum, hevur fingið av søluvirðinum. Fiskimálaráðið veit heldur ikki, um hetta verður skrásett aðrastaðni, ella um skipanir yvirhøvur eru, har søluvirði á fiskifari verður býtt millum skipaeigara og manning, ið ikki eigur í fiskifarinum.

**Til nr. 8.**
Fiskimálaráðið og stovnar tess skulu ikki góðkenna fiskiskipasølur sum so. Tá fiskifør skifta eigara, er leikluturin hjá almenna myndugleikanum at veita tilsøgn um, at keyparin kann yvirtaka fiskifarið, treytað av, at hann lýkur treytirnar í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi, herundir ognar- og avgerðarviðurskifti og útlendskan ognarlut.

Til tess at eftirkanna eigara- og avgerðarviðurskiftini í fiskiflotanum og at tryggja, at útlendsk áhugamál eru umboðað innanfyri tey mørk, sum lógin fyriskrivar, biður Fiskimálaráðið um hesi skjøl og upplýsingar:

1) Stovningarsamtykt
2) Viðtøkur fyri felagið
3) Starvsreglugerð fyri nevndina
4) Prógv fyri innføring í yvirlit yvir partaeigarar
5) Møguligan partaeigarasáttmála
6) Onnur skjøl, sum hava týdning fyri ognarviðurskiftini og avgerðarrættin í felagnum, herundir lániavtalur
7) Avrit av seinasta ársroknskapi
8) Váttan um, at ongar aðrar avtalur viðvíkjandi eigara- og avgerðarviðurskiftunum enn tær, sum Fiskimálaráðið hevur fingið innlit í, eru gjørdar í hesum sambandi. Váttan skal fyriliggja frá ávikavist partaeigarum, nevndarlimum og stjórn.

**Til nr. 9.**
Lógin um vinnuligan fiskiskap forðar ikki fyri, at fiskifør verða seld, og at rætturin til veiðiloyvið kann fylgja við. Praksis er, at tá fiskifør skifta eigara, loyvir Fiskimálaráðið, at fiskirættindini kunnu fylgja við søluni, treytað av, at keyparin lýkur treytirnar fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi.

Mál um at flyta veiðiloyvi millum fiskifør verða viðgjørd eftir grein 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Heimild er at flyta veiðiloyvi á skip við ongum veiðiloyvi (stk.1), at flyta veiðiloyvi á fiskifar við veiðiloyvi (stk.2) ella at flyta tvey veiðiloyvi á skip við ongum veiðiloyvi (stk.3). Eftir grein 8, stk.4 er heimild at lata eigara av fiskifari tilsøgn um at varðveita veiðiloyvið í upp til tvey ár, uttan at hava skip.

Fyrisitingarliga uppgávan í sambandi við mál um at flyta veiðiloyvi eftir heimildunum í grein 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap er at tryggja, 1) at lógarásetta treytin um fiskiorku er lokin, 2) at treytirnar til útlendskan eigara- og avgerðarrætt eru loknar sbrt. § 7 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og 3) at flytingin av veiðiloyvum ikki hevur við sær, at feløg ella persónar fáa ræðið yvir fleiri fiskirættindum enn ásetta hámarkið í § 7 a í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

**Til nr. 10.**
Eg haldi, at grundreglan í allari skipanini er - og eigur at vera - at fiskiríkidømið er ogn landsins. Løgtingið og landsstýrið umsita fiskatilfeingið vegna Føroya fólk, og kunnu skipa fiskiskapin við lógum og kunngerðum, sum seta karmar og treytir fyri fiskiskapinum. Rætturin at fiska er ikki privatur ognarrættur, men ein brúksrættur.

Lógir og kunngerðir eiga at stuðla undir skynsaman rakstur, virðisskapan og produktivitet. Eg haldi, at ein liður í hesum er, at vinnan hevur møguleika at tillaga virksemið og optimera raksturin við at flyta veiðiloyvi og at avhenda fiskirættindi.

Sum eg dugi at síggja, eru nógvar av sølunum av fiskiførum og flytingum av veiðiloyvum í ár gjørdar við eittans endamáli – nevniliga at fáa gagnnýtt makrelkvotur í 2014 við betri egnaðum fiskiførum.

**Jacob Vestergaard**
*landsstýrismaður*